## UTTAN ÚR HEIMI



*Jødiskir niðursetumenn mótmæla, at teir noyðast at flyta úr Gaza-geiranum. Men teir flestu gera kortini eftir boðunum frá stjórnini*

*Mynd: Reuters*

# Tey flestu fara við góðum

**Tey flestu jødisku niðursetufólkini fara væntandi úr Gaza-geiranum við góðum, men nøkur fara at seta seg uppímóti kravboðunum um at flyta**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Vit fara at biðja, tá hermenninir koma eftir okkum, og vit vænta ikki, at teir fara at gera okkum ónáðir, meðan vit biðja, sigur ein av niðursetumonnunum í bygdini Neve Dekalim.

Men tey flestu niðursetufólkini fara at gera eftir boðunum frá stjórnini um at flyta, áðrenn freistin rennur út á midnátt í kvøld. Tey, sum ikki eru farin tá, verða flutt við makt.

– Vit vænta, at helvtin av fólkinum í Gush Katif og hinum bygdunum eru eftir, tá freistin rennur út, segði generalurin Guy Tzur sunnudagin. Hann vildi ikki siga, hvussu herurin fer at bera seg at við at fáa tey seinastu avstað, men longu í gjár gingu løgreglumenn og hermenn hús úr húsi og kannaðu, um fólk vóru farin.

Myndugleikarnir hava ikki dult fyri, at teir vænta samanbrestir ímillum hermenn og niðursetumenn. Støðan hevur verið serliga spent í fimm bygdum, og herurin hevur boðað frá, at hann fer ikki at senda hermenn hagar í fyrsta umfari. Tað eru tó ikki bara niðursetufólk í teimum fimm bygdunum, tí sambært myndugleikunum eru umleið 5.000 mótmælisfólk komin úr Ísrael, og tey fara uttan iva at seta seg upp ímóti øllum boðum frá myndugleikunum, skrivar DPA.

Samstundis sum tey jødisku niðursetufólkini fara úr Gaza, fyrireika palestinsku myndugleikarnir seg til at taka við eftirlitinum í bygdunum. Í gjár vóru meiri enn 7.000 palestinskir løgreglumenn á varðhaldi uttan fyri bygdirnar at forða fyri, at víðgongdir palestinar skuldu geva niðursetufólkunum eina seinastu heilsan á vegnum til Ísraels.

### Brenna húsini

Burtursæð frá lendinum fáa palestinar ikki nógv burturúr, at niðursetufólkini fara úr Gaza. Ariel Sharon hevur givið boð um, at øll sethúsini hjá niðursetufólkunum skulu brennast, áðrenn palestinar yvirtaka bygdirnar. Aðrir bygningar verða standandi.

Summi sethús eru longu brunnin í grund, tí eigararnir vildu tryggja sær, at palestinar ikki sluppu at flyta inn í tey, skrivar Reuters.

# Sri Lanka á eggini til borgarakríggj

**Morðið á srilankiska uttanríkisráðharran hóttir við at forkoma friðinum í landinum. Enn er eingin tikin í sambandi við morðið, og landið er sett í undantaksstøðu**

SRI LANKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Teir tamilsku tikararnir har norðuri í landinum hava avsannað, at teir høvdu nakað samband við tilburðin, tá Lakshman Kadingamar, uttanríkisráðharri, bleiv skotin um vikuskiftið. Men myndugleikarnir í Colombo tykjast hava eina aðra uppfatan av støðuni.

– Vit fordøma hesa brotsgerðina, og sambært trygdarkeldunum var tað tann tamilski frælsisherurin, sum myrdi hann, segði Mathinda Rajapaksa, forsætisráðharri, sunnudagin.

Í Sri Lanka undrast fleiri á, hvussu tað bera til, at uttanríkisráðharrin bleiv myrdur. Sagt verður, at eingin ráðharri hevði so góða verju sum hann, men kortini eydnaðist tað drápsmonnunum at skjóta hann. Hann varð raktur í høvdið og bringuna og doyði stutt eftir.

Lakshman Kadingamar var sjálvur tamili, men ein av teimum fáu kristnu tamilunum, og summir tamilar vildu vera við, at hann arbeiddi ímóti tí tamilska minnilutanum, og at hann tí var ein svíkjari. Men talsmenn hjá tamilunum halda uppá, at tað vóru ikki tamilar, sum myrdu hann, men at stjórnin heldur eigur at leita ímillum sínar egnu, ætlar hon at finna drápsmenninar.

Útlendskir eygleiðarar í Sri Lanka siga, at støðan í landinum er sera spent, og at landið er á eggini til borgarakríggj. Chandrika Kamaratunga, forseti, hevur lýst landið í undantaksstøðu.

## Neyðugt við meiri hjálp

Heimssamfelagið hevur sett sær fyri, at í seinasta lagi í 2015 skulu børnini í Afrika hava nóg mikið til matna, men nú ávarar ein granskingarstovnur um, at við verandi hjálp verður málið ikki rokkið. Tvørturímóti sigur stovnurin, at við verandi gongd verður talið á svøltandi børnum í Afrika 3,3 milliónir størri í 2015 enn í dag.

International Food Policy Research Institute sigur í einari nýggjari frágreiðing, at sum er hava umleið 200 milliónir fólk í londunum sunnan fyri Sahara ov lítið til matna, og tey eru sostatt næstan 90 milliónir fleiri enn fyri 35 árum síðani. Av teimum, sum hava ov lítið til matna, eru 38,6 milliónir børn, men verður ikki meiri ferð sett á hjálpina, verða børnini 41,9 milliónir í tali um tíggju ár, sigur IFPRI.

Í løtuni roynir heimssamfelagið at hjálpa teimum svøltandi í Niger, men Kofi Annan, ST-aðalskrivari, ávarar um, at verður ikki skjótt atborið, fara fleiri milliónir fólk í londum longri suðuri í Afrika at líða neyð seinni. Í einum brævi til leiðararnar í teimum ríkastu londunum í heiminum mælir Annan til, at 800.000 tons av mati verða send hesum londunum, so ST kann fyribyrgja, at fólk har fara at líða hungur.

Millum londini, sum eru ringast fyri, eru Malawi, Lesotho, Swasiland, Mosakbik, Zambia og Zimbabwe. Áhaldandi turkur er høvuðsorsøkin til, at jørðin hevur givið ov lítið av sær.

## Ungir danir fara til Islam

Hvørja viku taka ímillum fimm og tíggju danir við islamskari trúgv, og gongdin vísir, at tað eru altsamt yngri og yngri fólk, sum velja ta trúnna fram um ta kristnu.

Tina Jensen, fólkalívsfrøðingur á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, sigur við Politiken, at næstan triði hvør dani, sum fer til ta islamsku trúnna, er tannáringur, og tað er nógv meiri enn fyrr, sigur hon. Teir muslimsku felagsskaparnir í stórbýunum Keypmannahavn, Århus og Odense siga fyri blaðnum, at árliga taka umleið 5.000 fólk við islamskari trúgv, og at tey ungu gerast alt fleiri og fleiri.

Í flestu førum eru tað ungar danskar kvinnur, sum taka við islamskari trúgv, og tað kemst vanliga av, at tær velja at giftast muslimskum monnum, skrivar Politiken.

## Tangaskip til Barentshavið

Ein fyritøka, sum norska felagið Aker og finska felagið Wærtzilæ eiga í felag, skal nú byggja tvey tangaskip, sum skulu flyta olju frá tí russiska partinum av Barentshavinum, tá framleiðslan har ætlandi fer í gongd um hálvtannað ár.

Tey bæði skipini skulu byggjast á einari skipasmiðju í St. Pætursborg. Tey verða 70.000 tons stór og styrkt, so tey kunnu sigla í ísi. Tey skulu sigla oljuna frá boripallunum á Pirazlomoje-økinum til eina stóra móttøkustøð í Murmansk-fjørðinum.

Gongst, sum russar ætla, byrjar framleiðslan í Pirazlomoje-økinum stutt fyri árslok næsta ár, men ætlanin hevur verið darvað av ymsum seinkingum. Økið, sum er sunnan fyri oyggjarnar Novaja Zemlja, verður hildið at hava umleið 83 milliónir tons av olju, og russar vænta at vinna olju har í umleið tjúgu ár, skrivar Aftenposten.

## Vilja einki siga enn

Enn veit eingin, hvør fer at stilla upp til forsetavalið í USA um góð trý ár, men fleiri nøvn verða nevnd.

George W. Bush, forseti, kann sum kunnugt ikki stilla upp aftur fyri republikanararnar, og tí hevur verið nevnt, at senatorurin John McCain ætlar sær at royna at gera valevni hjá republikanarunum næstu ferð. Í einari sjónvarpssamrøðu sunnukvøldið segði hann, at hann hevur ikki tikið avgerð enn. Støðan er mitt ímillum ja og nei, segði John McCain.

Fleiri vænta, at fyrrverandi forsetafrúan Hillary Clinton verður forsetavalevni hjá demokratunum í 2008, um hon vil stilla upp. Eitt annað navn, sum hevur verið frammi, er senatorurin Joseph Biden. Hann segði sunnudagin, at hann er í ferð við at kanna, um hann kann fáa nóg mikið av pengum til tað sera kostnaðarmikla valstríðið, men at enn er ov tíðliga at siga, um tað fer at eydnast.